# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 20-12-2024 |
| Mál nr.: | 24/26392 |
| Málsviðgjørt: | HW |
| Ummælistíð: | Frá 20.desember 2024 til 21.januar 2025 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
(Ásetingar um skipan av lærugreinum, tal av undirvísingartímum, skúlaøki og skúlasamband)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2, stk. 3 verður aftan á “javnvirði” sett “inklusjón”.

**2.** § 5, stk. 2, nr. 2, litra d verður orðað soleiðis:
“d) Alisfrøði og evnafrøði: 7.-9. skúlaári”.

**3.** § 5, stk. 2, nr. 4 verður orðað soleiðis:
“4) Handaverki og list:
a) Sangi og tónleiki: 1.-6. skúlaári.
b) Tilevning: 1.-6. skúlaári.
c) Handarbeiði: 1.-6. skúlaári.
d) Smíð: 1.-6. skúlaári.
e) Heimkunnleika: 1.-6. skúlaári.

**4.** § 5, stk. 4 verður orðað soleiðis:
“Undirvísing í týskum skal standa næmingunum í 7.-9. flokki í boði. Annað fremmandamál kann tó verða valt í staðin fyri týskt”.

**5.** Í § 9, stk. 1 verður “8.-10. flokki” broytt til: “7.-10. flokki”.

**6.** § 14, stk. 2 verður orðað soleiðis:

“Hjá næmingum, sum eru á 7.-10. floksstigi, verður støða teirra í royndarlærugreinunum, smb. § 16, 2.-6. stk. lýst við talmetum (støðutalmetum)”.

**7.** Í § 14, stk. 8 verður “8.-10. floksstigi” broytt til: “7.-10. floksstigi”.

**8.** § 19, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis:
“Í ársbýttum skúla er vikutímatal næminganna tey 6 fyrstu skúlaárini 156 undirvísingartímar, og 249 undirvísingartímar um skúlin harumframt hevur 7.-9. flokk.
*Stk. 2.* Undirvísingartímatal næminganna um vikuna í hvørjum flokki er:
1) Í 1. flokki, 23 tímar.
2) Í 2. flokki, 23 tímar.
3) Í 3. flokki, 25 tímar.
4) Í 4. flokki, 28 tímar.
5) Í 5. flokki, 28 tímar.
6) Í 6. flokki, 29 tímar.
7) Í 7. flokki, 31 tímar.
8) Í 8. flokki, 31 tímar.
9) Í 9. flokki, 31 tímar”.

**9.** § 19, stk. 7 verður orðað soleiðis:
“Í skúlum, sum ikki eru ársbýttir, og sum kunnu hava næmingar fyrstu 6 skúlaárini, eigur vikutímatal næminganna í tí einstaka skúlanum at verða lagað eftir næmingatali og aldursbýti næminga, og skal tað í minsta lagi vera:
1) Í 1-flokkaðum skúla, 20 tímar.
2) Í 2-flokkaðum skúla, 40 tímar.
3) Í 3-flokkaðum skúla, 70 tímar.
4) Í 4-flokkaðum skúla, 100 tímar og
5) Í 5-flokkaðum skúla, 120 tímar”.

**10.** Í § 26, stk. 1 verður “tey 7 fyrstu skúlaárini” broytt til: “tey 6 fyrstu skúlaárini”.

**11.** Í § 26, stk. 1 og stk. 3 og í § 29, stk. 2 verður “í 8., 9. og 10.” broytt til: “í 7., 8., 9. og 10.”.

**12.** Í § 31, stk. 2 og stk. 3 verður “8.-10. flokk” broytt til: “7.-10. flokk”

**13.** Í § 34, stk. 1 verður “í 8.-10. flokki” broytt til: “7.-10. flokki”.

**14.** Aftan á § 41 verður sett:

“**§ 41 a.** Allir næmingar hava rætt til at vera í einum tryggum skúlaumhvørvi, sum fremur inklusjón, trivnað, læring og heilsu.
*Stk. 2.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um inklusjón”.

## § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2026.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

**1.1. Orsakir til uppskotið**
Í 2023 handaði ein arbeiðsbólkur álit um broytingar í Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022 (Fólkaskúlalógin). Fyrrverandi landsstýrismaður, Jenis av Rana, setti arbeiðsbólkin og núverandi landsstýrismaður, Djóni Nolsøe Joensen, valdi at lata arbeiðsbólkin halda fram, tí arbeiðsuppgávurnar, ið arbeiðsbólkurin arbeiddi við samsvaraði væl við stevnumiðini hjá nývalda landsstýrinum, sum í samgonguskjalinum hevði sett sum mál fyri fólkaskúlan:

- at stytta skúladagin,
- at skúlarnir fáa størri frælsi at skipa skúladagin,
- at endurskoða lærugreinabýtið
- at javnvág skal vera millum hugvísindi, náttúruvísindi og skapandi læru,
- at kveikja skapandi og verkliga lærihugin hjá børnunum,
- at raðfesta flokslæraraleiklutin,
- at styrkja tvílæraraskipanina í grunddeild og
- at lækka talið av næmingum í hvørjum flokki.

Hetta seinasta punktið um at lækka næmingatalið í hvørjum flokki varð samtykt í lógarbroyting seinastu tingsetu.
Broytingarnar taka støði í omanfyrinevnda áliti, umframt trivnaðarkanning, ið Fróðskaparsetur Føroya gjørdi fyri Barna- og útbúgvingarmálaráðið í 2023 og harumframt inniber broytingin nýggja áseting um inklusjón í fólkaskúlanum, sum skal vera við til, at Føroyar taka týðandi stig fyri at leggja seg eftir politisku visjónini um ein inkluderandi skúla.

***Inklusjón***
Inkluderandi skúlaumhvørvi hevur verið á altjóða skúlapolitiska breddanum síðani 1994 við Salamanca yvirlýsingini og hevur ávirkað skúlapolitiska lóggávu og praksis í nógvum londum, sum vit samanbera okkum við (t.d. Norra, Finnland, Ísland og Danmark). Hóast nøkur fet í á eini meira inkluderandi kós, m.a. við ratifiseringini av ST-sáttmálanum um rættindi hjá teimum, ið bera brek (Føroya Løgting, 2009), har Føroyar við hesum hava bundið seg til at arbeiða fyri at menna og tryggja eitt inkluderandi skúlaumhvørvi (sí serliga grein 24 í sáttmálanum), so er enn ikki staðfest í fólkaskúlalógini, at tað er ein inkluderandi skúli vit miðja eftir.

Hetta at Føroyar enn ikki miðvíst hava lagt eina skúlapolitiska ætlan at menna ein inkluderandi skúla m.a. staðfest í fólkaskúlalógini ávirkar, um og hvussu skúlaskipanin og skúlar í verki arbeiða við at menna ein inkluderandi skúla. Hetta sæst aftur í samlaða skúlaverkinum, sum seinnu árni hevur merkt ein vaksandi tørv og trýst á at íverkseta serskipanir. Hetta skjótt vaksandi talið av sertilboðum og børnum, sum vera víst til sertilboð benda á, at vit ikki í nóg stóran mun hava megnað at ment ein inkluderandi skúla. Eisini vísir nýggjasta frágreiðingin

frá Sameindu Tjóða (CRPD, sept 2024) nettup á, at nevndin er stúrin um økta talið av næmingum, sum fáa undirvísing í segregeraðum undirvísingartilboðum í øllum kongaríkunum Danmark. Heitt verður á skúlamyndugleikarnar at virka fyri, at fleiri næmingar verða inkluderaðir í skúlaverkinum.

Tað er staðfest bæði í altjóða og føroyskari gransking innan inkluderandi skúlaskap (Poulsen, 2023), at menning av inklusjón má vera kjølfest í lokalu skúlapolitisku lóggávuni, fyri at tryggja, at tað ikki verður upp til tað einstøku skúlaleiðsluna, lærara ella onnur at avgera um ein vil arbeiða fyri inklusjón. At menna inkluderandi skúlaskap krevur miðvísa ætlan og kós og har hevur skúlalóggáva ein avgerandi leiklut. Hetta fyri at tryggja øllum børnum rættindi til dygdargóðan almennan skúla, og harvið minka um sannlíkindi fyri eksklusjón og marginalisering (sí m.a. grein 23 og 28 í Barnarættindasáttmálanum um týdningin at virða rættindi hjá øllum børnum til menning, lærdóm og útbúgving).

Tá ið menning av inkluderandi skúlaumhvørvið umræður hevur tað týdning, at sjóneykan verður vend at tí almenna skúlaumhvørvinum og ikki at tí einstaka barninum. Hetta tí inkluderandi skúlar eru ikki eitt nýtt heiti fyri sernámsfrøði ella virksemi, sum er ætlað ávísum bólkum av næmingum. Hinvegin royna teir í størstan mun at sleppa sær av við heiti so sum “næmingar við serligum tørvi,” tí slík einstaklingsmiðað eyðmerking flytir fokus frá skipanarligum forðingum til persónligar avbjóðingar.

Inklusiónsmálið vendir heldur eygað móti forðingum, sum kunnu vera allastaðni í skipanini: í skúlanum, stuðulsskipanum, samfelagnum, ella lóggávuni. Hesar forðingar kunnu ávirka læring og luttøku hjá øllum næmingum – ikki bert hjá teimum, sum vanliga verða flokkaðir sum "við serligum tørvi."

Við hesum í huga hevur tað ógvuliga stóran týdning, at inklusjónsvisjónin verður niðurfelt í almennu skúlapolitisku lóggávuna. Higartil er orðið inklusjón at finna í nøkrum skúlapolitiskum skjølum, sum tó nærum øll hava kjølfesti í sernámsfrøðini. Undantak er nýggju námsætlanirnar frá 2023. M.a.í tilmælum til Mentamálaráðið um sernámsfrøði frá 2011 (Fólkaskúlaráðið, 2011) og 2014 (Mentamálaráðið, 2014), í uppritinum um Førleikastovur frá 2012 (Mentamálaráðið, 2012), og í kunngerðum frá 2018 og 2019 um serundirvísing, sernámsfrøðiligan tørv, sernámsfrøðiligan stuðul (Kunngerð um sernámsfrøði, 2018) og Førleikastovur (Kunngerð um førleikastovur, 2019) og í tilmæli um børn við avbjóðingum (Knudsen et al., 2023).

***Stytta skúladagin***

Í tráð við álitið og í samsvar við stevnumiðini í samgonguskjalinum er ætlanin at stytta skúladagin.

Tað eru serliga tríggjar meginorsøkir til hesa lógarbroyting, og hesar eru øktur trivnaður, størri effektiv nýtsla av undirvísingartímunum og betri faklig dygd og læruúrtøka.

Í álitinum um broytingar í fólkaskúlalógini er víst á, at føroysku skúlabørnini hava longstu skúlavikuna samanborið við næmingar í grannalondunum.

Kanningar vísa, at læruúrtøkan er munandi minni í teimum seinastu undirvísingartímunum á degnum, og lærarar og skúlaleiðarar siga frá, at næmingarnir eru merktir av mótloysi og lítlari orku móti endanum av longu skúladøgunum.

Endamálið við at minka um undirvísingartímarnar er tí at bøta um hesi viðurskifti, soleiðis at næmingarnir fáa ein meiri hóskandi skúladag, har tey ikki møðast og gerast líkasæl, soleiðis at næmingarnir hinvegin varðveita bæði orku, vilja, forvitni og náttúrliga áhugan at læra.

Ein onnur týdningarmikil grundgeving fyri at minka um vikutímatalið er, at hóast føroyskir næmingar hava fleiri undirvísingartímar enn í okkara grannalondum, so er fakligi førleikin ikki samsvarandi við hægri tímatalið. Við hesi lógarbroyting verður tað møguligt at hava størri fokus á dygdina av undirvísingini heldur enn bert talið av tímum.

Eitt av endamálunum er, at lærararnir fáa meira tíð, rúm og umstøður at menna undirvísingina, samstundis sum næmingarnir fáa betri møguleikar bæði at varðveita sín áhuga, sín hug og sín eldhug at læra.

Ein annar týdningarmikil partur av lógarbroytingini er, at hetta sbrt. útrokningum hjá Undirvísingarstýrinum kemur at føra við sær eina fíggjarliga sparing á umleið 35 ársverk. Ætlanin er at nýta hesar pengar til at styrkja um tvílæraraskipanina og at økja um tíðina hjá flokslærararunum, sum bæði eru avgerandi fyri trivnað og læring hjá næmingunum, sí partin longur niðri um at styrkja flokslæraraleiklutin og tvílæraraskipanina.

Í galdandi lóggávu stendur, at undirvísingartímatal næminganna í minsta lagi eigur at verða í 1. flokki: 24 tímar, í 2. flokki: 26 tímar, í 3. flokki 28 tímar, í 4. flokki: 30 tímar, í 5., 6., og 7. flokki: 31 tímar og í 8. og 9. flokki 28 tímar. Í 7. flokki eru seinni komnir 2 tímar afturat í samfelagsfrøði, soleiðis at samlaða talið í 7. flokki í dag er 33 tímar um vikuna.
Í 8. og 9. flokki eru eisini 2 tímar í samfelagsfrøði komnir afturat, soleiðis at kravda tímatalið er 30 tímar. Harumframt eru vallærugreinar í 8. og 9. flokki, harímillum 4 tímar í týskum og 3 tímar í alis- og evnafrøði, sum næmingarnir skulu hava, um teir eftir loknan fólkaskúla skulu hava atgongd til ávíkavist hugbreyt og náttúrubreyt.
Sum dømi kann nevnast, at um næmingur ivast og tí ikki vil verða noktaður atgongd til bæði hugbreyt og náttúrubreyt, ja so hevur hann í verandi skipan 37 tímar um vikuna, og skal hann so hava onkra áhugaverda vallærugrein afturat, so hevur hann heili 39 undirvísingartímar um vikuna, og tá er ivasamt hvussu nógv tíð er til heimaarbeiði og frítíðarvirksemi.

Við hesi lógarbroyting verða tað í 1. og 2. flokki 23 tímar og í 3. flokki 25 tímar um vikuna. Harvið er tað í grunddeildini ein lækking á tilsamans 7 undirvísingartímar um vikuna.

Í 4. og 5. flokki verða tað framyvir 28 tímar um vikuna og í 6. flokki 29 tímar um vikuna. Í miðdeildini verður tað hervið ein samlað lækking á 7 undirvísingartímar um vikuna.

Í 7., 8,. og 9. flokki verða tað íroknað vallærugreinir í alt 31 undirvísingartímar um vikuna. Í hádeildini verður tað ein samlað lækking á 14 tímar um vikuna, tá vit íroknað vallærugreinarnar alis-evnafrøði og týskt.

***Skúlarnir fáa størri frælsi at skipa skúladagin, endurskoða lærugreinabýtið og harvið fáa javnvág millum hugvísingi, náttúruvísindi og skapandi læru.***

Við broytingini í uppskotinum, verður lagt upp til, at tíma- og lærugreinabýti verður broytt. Sambært § 19, stk. 10 í Fólkaskúlalógini ger landsstýrismaðurin reglur um tíma- og lærugreinabýtið. Verður uppskotið um broytingar í Fólkaskúlalógini samtykt, ætlar landsstýrismaðurin at áseta nýtt tíma- og lærugreinabýti.
Ætlanin er, at nýggja tíma og lærugreinabýti ikki at skal áseta neyvt tímatal í hvørjari lærugrein sær, men at lærugreinarnar verða bólkaðar og at eitt ávíst tímatal verður lagt í hvønn bólk, soleiðis, at skúlin hevur størri rásarúm at leggja skúladagin til rættis og tillagað skúladagin eftir tørvinum hjá einstaka skúlanum ella einstaka flokkinum.

Í hesum nýggja tíma- og lærugreinabýtinum verður hóskandi javnvág millum tey fýra økini hugvísindi, náttúruvísindi, mentan & samfelag og likamlig & skapandi læring.
Í nýggja tíma- og lærugreinabýtinum verður bert neyvt ásett, hvussu nógvir tímar skulu verða á hvørjum floksstigi innan hvørt av teimum fýra lærugreinaøkjunum.

Fyrimunirnir við at nýggja tíma- og lærugreinabýtið er skipað og ásett á henda hátt meira miðspjatt, er, at skúlarnir fáa størri frælsi og rásarúm at leggja tímatalvur, tilrættisleggja vikuætlanir og ráðleggja undirvísing meira fleksibult, har tað ikki frá meginfyrisitingini er ásett niður í smálutir, júst hvussu nógvar tímar skulu verða í hvørjari serstakari lærugrein á hvørjum einstøkum floksstigi.

Broytingin ber við sær, at tað gerst lættari hjá skúlunum at ráðleggja tvørfakliga undirvísing innan hvørt av teimum fýra lærugreinapartunum. Innan t.d. mállærugreinar verður lættari at ráðleggja undirvísing í mállæru ella bókmentum tvørturum tær ymsu mállærugreinarnar, og innan náttúruvísindi gerst tað lættari at samskipa tvørfakliga undirvísing við ymsum verkætlanum, økjum og evnum innan náttúruvísindi.

Sum dømi kann nevnast tvørfaklig undirvísing í evnum sum orka, burðardygd, verðurlagsávirkan o.s.fr., og kann hetta gerast við at inndraga arbeiðshættir, evni og innihald innan landa, lív, stødd, evna og alisfrøði.

Eitt boð uppá eitt nýtt tíma- og lærugreinabýtið kundi verið hetta niðanfyri:

**Grunddeild:**

| Lærugreinar | Tímar 1. fl. | Tímar 2. fl. | Tímar 3. fl. |
|---|---|---|---|
| Mállærugreinar (føroyskt & danskt) | 8 | 8 | 9 |
| Náttúruvísindi (ro og heimstaðarlæra) | 8 | 8 | 9 |
| Mentan, samfelag (kristnikunnleiki) | 2 | 2 | 2 |
| Likamlig & skapandi læra Ítr/svi & handaverk/list) | 5 | 5 | 5 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Tilsamans** | 23 | 23 | 25 |

*OBS: Danskt byrjar í 3. flokki.

**Miðdeild:**

| **Lærugreinar** | **Tímar 4. fl.** | **Tímar 5. fl.** | **Tímar 6. fl.** |
|---|---|---|---|
| **Mállærugreinar (føroyskt, danskt, enskt)** | 10 | 10 | 10 |
| **Náttúruvísindi (ro, náttúra & tøkni )** | 8 | 8 | 8 |
| **Mentan & samfelag (søga & kristni)** | 4 | 4 | 4 |
| **Likamlig & skapandi læra (ítr/svi, handaverk & list)** | 6 | 6 | 7 |
| **Tilsamans** | 28 | 28 | 29 |

**Hádeild:**

| **Lærugreinar** | **Tímar 7. fl.** | **Tímar 8. fl.** | **Tímar 9. fl.** |
|---|---|---|---|
| **Mállærugreinar (føroyskt, danskt, enskt)** | 10 | 10 | 10 |
| **Náttúruvísindi (ro, alisf/evnaf. lívf. landaf.)** | 10 | 10 | 10 |
| **Mentan og samfelag (kristni, søga, samf.)** | 5 | 5 | 5 |
| **Likamlig & skapandi læra (ítr/svi & vallærugreinir)** | 6 | 6 | 6 |
| **Tilsamans** | 31 | 31 | 31 |

***OBS: Ìroknað vallærugreinir er lærugreinin týskt.**

***Raðfesta flokslæraraleiklutin***

Tað hevur týdning fyri fakligu menning næminganna, og ikki minst fyri sosiala trivnaðin í flokkinum, at flokslærarin hevur nøktandi tíð og arbeiðsumstøður.

Ein flokslærari við meira tíð og tættari relatión til næmingarnar, kann betri fylgja við í teirra trivnaði og taka hond um teirra sosialu og fakligu avbjóðingar.

***Styrkja tvílæraraskipanina í grunddeild***
Tvílæraraskipanin, har tveir lærarar samstarva um undirvísingina í einum flokki, hevur víst seg at virka væl, tá tað kemur til at betra um trivnað og læring hjá næmingum. Tvílæraraskipanin gevur betri møguleika at laga undirvísingina til einstøku næmingarnar, og tí verður ætlanin nú at nýta sparingina til at víðka um hesa skipan. Næmingarnir skulu fáa gagn av, at fleiri lærarar eru um flokkin, og at lærararnir betri kunnu samstarva um at skipa eina fjølbroytta og inkluderandi undirvísing, sum rúmar øllum næmingum.

## 1.2. Galdandi lóggáva

*Alis- og evnafrøði*
Í galdandi lóggávu er alis- og evnafrøði kravd lærugrein í 7. flokki og vallærugrein í 8. og 9.flokki. Í álitinum um broytingar í fólkaskúlalógini verður funnist at hesum, at alis- og evnafrøði ikki eisini er kravd lærugrein í 8. og 9. flokki.

*Handverk og list*
Sambært galdandi lóggávu skulu næmingar hava undirvísing í lærugreinunum; sangi og tónleiki, tilevning, handarbeiði, smíð og heimkunnleika frá 1.-7.flokk.

*Týskt*
Í galdandi lóggávu er týskt ella annað fremmandamál vallærugrein í 8. og 9. flokki. Hetta hongur ikki væl saman við, at alis-evnafrøði eins og fleiri aðrar nýggjar lærugreinir byrja í 7. flokki. Í 7. flokki fáa næmingarnir á fyrsta sinni undirvísing í lærugreinunum samfelagsfrøði, landalæru, lívfrøði, alisfrøði og evnafrøði

*Vallærugreinar*
Sambært galdandi lóggávu skulu næmingar hava vallærugreinar í boði frá 8.-10.flokk.

*Støðutalmet*
Í galdandi lóggávu skulu næmingar hava støðutalmet í royndarlærugreinum frá 8.-10.flokk í minsta lagi tvær ferðir um árið.

*Vikutímatal*
Í galdandi lóggávu stendur, at undirvísingartímatal næminganna í minsta lagi eigur at verða í 1. flokki: 24 tímar, í 2. flokki: 26 tímar, í 3. flokki 28 tímar, í 4. flokki: 30 tímar, í 5., 6., og 7. flokki: 31 tímar og í 8. og 9. flokki 28 tímar. Í 7. flokki eru seinni komnir 2 tímar afturat í samfelagsfrøði, soleiðis at samlaða talið í 7. flokki í dag er 33 tímar um vikuna.
Í 8. og 9. flokki eru eisini 2 tímar í samfelagsfrøði komnir afturat, soleiðis at kravda tímatalið er 30 tímar. Harumframt eru vallærugreinar í 8. og 9. flokki, harímillum 4 tímar í týskum og 3 tímar í alis- og evnafrøði, sum næmingarnir skulu hava, um teir eftir loknan fólkaskúla skulu hava atgongd til ávíkavist hugbreyt og náttúrubreyt. Tað er krav, at tú hevur havt týskt í fólkaskúlanum fyri at verða upptikin á hugbreyt, og fyri at verða upptikin á náttúrubreyt, skal næmingur hava havt alis- og evnafrøði í fólkaskúlanum.
Sum dømi kann nevnast, at um næmingur ivast og tí ikki vil verða noktaður atgongd til bæði hugbreyt og náttúrubreyt, ja so hevur hann í verandi skipan 37 tímar um vikuna, og skal hann so hava onkra áhugaverda vallærugrein afturat, so hevur hann heili 39 undirvísingartímar um vikuna, og tá er ivasamt hvussu nógv tíð er til heimaarbeiði og frítíðarvirksemi.

Í galdandi lóggávu er í § 19 ásett, hvussu nógvar undirvísingartímar næmingarnir í minsta lagi eiga at hava í hvørjum einstøkum árgangi. Atfinningar hava verið ímóti, at næmingarnir hava ov nógvar undirvísingartímar um vikuna, og tilmælið frá arbeiðsbólki um broytingar í fólkaskúlalógini er, at vikutímatalið eigur at verða lækkað, soleiðis at skúladagurin hjá næmingunum ikki gerst ov drúgvur og møtimikil.

*Inklusjón*
Talan er um nýggja áseting. Inklusjón verður ikki nevnt í galdandi lóggávu.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Høvuðsendamálið við hesum lógarbroytingum er at betra um læruúrtøkuna og trivnaðin hjá næmingunum í føroyska fólkaskúlanum. Endamálið við broytingunum er samstundis sum heild at tillaga lógina og gera tillagingar, sum bøta um lógina og um samlaðu støðuna í fólkaskúlanum.
Eftir lakaru úrslitini frá PISA kanningini í 2006 var eftirfylgjandi sett inn við fleiri undirvísingartímum til tess at styrkja og betra um fakligu úrtøkuna hjá føroysku næmingunum. Her tyktist grundtankin verða, at við at økja um undirvísingartímatalið økja vit samstundis um læruúrtøkuna hjá næmingunum. Seinastu árini hava vit tó ásannað, at vit ikki neyðturviliga fáa betri úrtøku við at seta inn við fleiri undirvísingartímum, men at vit harafturímóti kunnu betra um úrslitini við at minka undirvísingartímarnar. Tí við ov nógvum undirvísingartímum kunnu næmingarnir troyttast, har teirra skúladagur kann kennast ov drúgvur og møðsamur. Við at minka um talið av undirvísingartímum er ætlanin at fáa enn meira orku og dygd í hvønn einstakan undirvísingartíma.

*Alis- og evnafrøði*

Endamálið við lógarbroytingini í § 5, stk. 2, nr. 2, litra d er, at lærugreinin Alisfrøði og evnafrøði frá at hava verið kravd lærugrein í 7. skúlaári, framyvir verður kravd lærugrein í 7. – 9. skúlaári. Henda broyting tekur støði í, at innan náttúruvísindi er alis- og evnafrøði grundarlagið undir bæði lívfrøði og landafrøði, umframt at alis- og evnafrøði sum lærugrein er tætt knýtt at støddfrøði, og sum tí við fyrimuni kann samstarva tvørfakligt við støddfrøði, har støddfrøði verður nýtt til at skilja og arbeiða við praktiskum og royndarfrøðiligum pørtum av alis- og evnafrøði.

At alisfrøði og evnafrøði nú verður kravd lærugrein hjá øllum næmingum í allari hádeildini, í staðin fyri bert í 7. flokki, samsvarar við økta tørvin á at stimbra náttúruvísindaliga vitan og førleikar hjá næmingum. Samstundis er hetta ein liður í at stuðla undir tey krøv, ið verða sett til næmingar, sum víðari velja lestrarleiðir innan vísindi, tøknifrøði og aðrar framfýsnar greinar og fakøki. Tað er týdningarmikið fyri eitt nú orkupolitikk, grøna menning og framhaldandi tøknilig framstig í samfelagnum, at næmingar longu í fólkaskúlanum fáa eina nøktandi grundleggjandi vitan á hesum økjum. Harumframt er umráðandi, at allir næmingar í fólkaskúlanum ogna sær haldgóða vitan um orku, dálking og burðardygd, sum eru tætt knýtt at okkara høvuðsvinnum aling og fiskiskapi, og sum somuleiðis hava stóran týdning í mun til føroyska vinnulívið, umhvørvið og veðurskifti annars í føroyska samfelagnum. Henda vitan innan alis- og evnafrøði eigur at koma øllum næmingum til góðar, har teir allir fáa høvi at gera kanningar og royndir, sum kunnu verða við til at menna teirra grundleggjandi náttúruvísindaligu førleikar.

Við alis- og evnafrøði sum kravdari lærugrein í hádeildini ber betri til at hava tvørfakliga undirvísing innan náttúruvísindi, har støddfrøði virkar sum eitt grundarlag, ið kann verða nýtt í bæði alis- og evnafrøði til at lýsa, gera modellir og rokna náttúrufyribrigdi og evnafrøðiligar tilgongdir. Sum dømi kann í hesum sambandi nevnast, at fleiri týdningarmiklar fysiskar lógir og prinsippir, eru orðað við støddfrøðiligum líkningum, og at lærarin í undirvísingini í alis- og evnafrøði tvørfakliga kann nýta støddfrøði til at útrokna rørslu, orkuumbýtið, evni, nøgd og mongdir. Við støði í øllum hesum eigur vitanin og førleikarnir innan alis- og evnafrøði at koma øllum næmingum í hádeildini til góðar. Henda broyting fer vónandi somuleiðis at føra til, at føroysku næmingarnir koma at fáa betri úrslit í PISA kanningunum innan náttúruvísindi.

### *Handverk og list*

Endamálið við broytingini er, at næmingarnir í grund- og miðdeildini fáa eina trygga, støðufasta og haldgóða førleikamenning innan handaverk og list. Hesar lærugreinir hava stóran týdning fyri menningina av kreativum førleikum, fatanini av estetikki og handaliga arbeiðinum hjá næmingum.

Við at hava tær sum kravdar lærugreinar í 1.-6. flokki verður tryggjað, at øll børn fáa grundleggjandi lærdóm í hesum týdningarmiklu førleikum.
Samstundis er greitt, at í hádeildini skal verða pláss fyri vallærugreinum, har næmingar hava skulu hava møguleika at velja lærugreinar innan handaverk og list sum vallærugrein, har teir kunnu víðka um síni evni á hesum økjum.

Við at handaverk og list eru kravdar lærugreinar í grund- og miðdeildini, verður sett fokus á at menna skapandi førleikar hjá næmingum í byrjanini av teirra skúlagongd. Hetta samsvarar væl við tørvin á at styrkja handaliga, estetiska og kreativa mentan, har næmingar læra at arbeiða við praktiskum og skapandi avbjóðingum. Í hádeildini skal verða møguligt hjá øllum næmingum at kunna velja tað fakøki innan handaverk og list, sum næmingarnir hava serligan tokka til, áhuga fyri ella førleikar til. Hetta ger tað møguligt hjá næmingum í hádeild, sum hava áhuga í at fara meira í dýpdina innan hetta øki, at velja kreativar, estetiskar og skapandi lærugreinar, sum samsvara væl við teirra áhugamál og framtíðarætlanir.

Í hádeildini verður tað upp til næmingarnar sjálvar at velja ta vallærugrein, sum teir ynskja at halda á fram við og víðarimenna. Hetta fakøkið hevur ein týdningarmiklan leiklut í menningini av kritiskum, sjálvstøðugum og skapandi hugsunarhátti hjá næmingum, sum sambært OECD eru týdningarmiklir 21. aldar førleikar.

### *Vallærugreinar frá 7.flokki*

Næmingarnir kunnu við lógarbroytingini frá 7. flokki taka lut í vallærugreinum sum tøknifrøði, sjóvinnu, ljósmyndalæru og arbeiðskunnleika, sum áður vóru tøkar næmingum í 8.-10. flokki.

Hetta stuðlar undir eina meira fjølbroytta og fakligt ríkari skúlagongd, har næmingar hava størri valmøguleikar at seta saman eina undirvísing, ið samsvarar betur við teirra egnu áhugamál og framtíðarætlanir.

Endamálið við broytingini er sostatt at stuðla undir eina fleksibla og næmingatillagaða skúlagongd, har næmingar longu frá 7. flokki fáa atgongd til vallærugreinar og evni, sum kunnu stimbra teirra áhugamál, evni og førleikar. Við at víðka um tilboðið til næmingar í 7. flokki verður skúlagongdin meira motiverandi, og næmingar fáa størri møguleika at menna seg innan kreativar, handaligar og praktiskar lærugreinir, samstundis sum teirra fakliga breidd verður tryggjað við teimum kravdu lærugreinunum.

Í galdandi tíma- og lærugreinabýti, har næmingarnir í hádeild íroknað týskt og alis- og evnafrøði hava 37 tímar um vikuna, er ikki nógv rúm og tíð til vallærugreinar.
Við hesum broytingum hava næmingarnir í hádeild í alt 31 undirvísingartímar um vikuna, harav 4 undirvísingartímar eru til vallærugreinar. Tískil verður við hesum broytingum betri tíð og umstøður hjá næmingunum í hádeild at velja vallærugreinar, sum tey hava áhuga fyri, eitt nú handaligar, listarligar og skapandi vallærugreinar.

*Støðumet frá 7. flokki*

Henda lógarbroyting tryggjar, at næmingarnir frá 7. flokki, fáa eina formella meting av fakligu støðu síni. Hetta tryggjar, at eftirmetingin verður javnt framd og býtt yvir alla hádeildina, soleiðis at næmingar og foreldur hava eina greiða og støðuga fatan av fakligu gongdini hjá næmingunum.

Broytingin stuðlar undir eini miðvísari eftirmeting, sum tekur støði í eini heildarmeting, ið er givin í talmetum. Henda metingin og eftirmetingin skal kunna gera tað møguligt fyri næmingin støðugt at menna seg fakliga í mun til framhaldandi undirvísing.

Við at flyta eftirmetingina av næmingum við talmetum frá 8.flokki niður til 7. flokk, verður eisini miðað eftir, at foreldur fáa eitt betri og meiri nágreiniligt innlit í fakliga støðuna hjá næmingunum. Hetta er partur av tilgongdini at tryggja eina javna og skipaða kunning og afturboðan (feedback) til bæði næmingar og foreldur, sum samsvarar við málið um, at undirvísingin og eftirmetingin stuðla undir fakliga framgongd og persónliga menning fyri einstaka næmingin. Talmetini verða givin sambært galdandi próvtalsstiga.

*Lækka tímatal*

Í álitinum um broytingar í fólkaskúlalógini er víst á, at føroysku skúlabørnini hava longstu skúlavikuna samanborið við næmingar í hinum Norðurlondunum. Føroyskir næmingar hava fleiri undirvísingartímar um vikuna, hóast vit hava 9 ára undirvísingarskyldu, í mun til lond við 10 ára skyldu. Hetta hevur ført til drúgvar skúladagar, har næmingar tykjast at møðast nógv, serliga móti endanum á skúladegnum.

Kanningar vísa, at læruúrtøkan er munandi minni í teimum seinastu undirvísingartímunum á degnum, og lærarar og skúlaleiðarar siga frá, at næmingarnir eru merktir av mótloysi og lítlari orku móti endanum av longu skúladøgunum. Endamálið við at minka um

undirvísingartímarnar er tí at bøta um hesi viðurskifti, soleiðis at næmingarnir fáa ein meiri hóskandi skúladag, har tey ikki møðast og gerast líkasæl, soleiðis at næmingarnir hinvegin varðveita bæði orku, vilja, forvitni og náturliga áhugan at læra.

Ein onnur týdningarmikil grundgeving fyri at minka um vikutímatalið er, at hóast føroyskir næmingar hava fleiri undirvísingartímar enn í okkara grannalondum, so er fakligi førleikin ikki samsvarandi við hægri tímatalið.

Eitt hægri tal av undirvísingartímum hevur víst seg ikki at hava verið nøkur trygd fyri betri læring, og tí er tað avgerandi at endurskoða hesa skipan, soleiðis at næmingarnir kunnu fáa betri lærdóm burturúr teirra undirvísing.

Við hesi lógarbroyting verður tað møguligt at hava størri fokus á dygdina av undirvísingini heldur enn bert talið av tímum. Eitt av endamálunum er, at lærararnir fáa meira tíð, rúm og umstøður at menna undirvísingina, samstundis sum næmingarnir fáa betri møguleikar bæði at varðveita sín áhuga, sín hug og sín eldhug at læra.

*Býtið millum miðdeild og hádeild*

Við lógarbroytingini verður býtið millum deildirnar broytt, soleiðis, at grunddeild er 1.-3.flokk, miðdeild er 4.-6.flokk og hádeild er 7.-9.flokk. Heitini eru ikki partur av lógini, men eru ein partur í hvussu skúlarnir skipa seg, sum eisini samsvarar við tíma- og lærugreinabýtið.

Ein týdningarmikil grundgeving fyri hesi lógarbroyting er, at 7. flokkur verður partur av hádeildini, og at móttøkuskúlar nú koma at taka ímóti næmingum eftir 6. flokk.

Hetta merkir, at næmingar í 7. flokki nú sleppa beinleiðis í skúlar við eini samlaðari hádeild, har teir fáa eina meira málrættaða og samanhangandi undirvísing, sum er skipað við útgangsstøði í tørvinum hjá eldri næmingum. Hetta inniber, at næmingar í 7. flokki fáa atgongd til fleiri vallærugreinir.

Tað er greitt betri fyri dygdina av undirvísingini í øllum hesum nýggju lærugreinunum í hádeildini, at undirvísingin í hádeild verður savnað í somu deild í einum og sama skúla. Hervið verður ein betri samanhangur fyri næmingarnar í undirvísingini, har tað verður ein meira smidlig yvirgongd frá undirvísingini í 7. flokki til 8. flokk, har skúlin hevur lært næmingin at kenna og hevur høvi at tillagað undirvísingina í mun til støðu næminganna. Her sleppur næmingurin undan einum brádligum avbroti í undirvísingini, har tey eftir at hava havt t.d. alis- og evnafrøði í 7. flokki, knappliga skulu hava hesa lærugrein í einum heilt øðrum skúla, við heilt øðrum og nýggjum lærarum, øðrvísi undirvísingartilfari og undirvísingarumhvørvi.

Við at flyta 7. flokk til hádeildina og lækka tímatalið fyrstu 6 skúlaárini, verður eisini betri samanhangur í, hvussu skúlagongdin er løgd til rættis í mun til fakligu og sosialu menning næminganna. Við lægri tímatali og við einum meira greiðum skilnaði millum miðdeild og hádeild, er endamálið at skapa betri karmar fyri læring og trivnað.

Henda broyting førir við sær, at móttøkuskúlar sum í verandi bygnaði sbrt. galdandi lóggávu, taka ímóti næmingum í 8. flokki eftir 7. flokk, framyvir koma at móttaka næmingar í 7. flokki eftir loknan 6. flokk.

Hetta ber við sær, at 11 fólkaskúlar sum í verandi bygnaði hava flokkar til 7. flokk, eftir hesa broyting koma at hava næmingar upp til 6. flokk. Hesir skúlar er Haraldssunds, Nólsoyar, Porkeris, Sumbiar, Viðareiðis, Kvívíkar, Skála, Eiðis, Húsar/Syðradals skúli, Frískúlin Keldan og Skúlin á Fossánesi. Taka vit skúlaárið 2024-2025 sum dømi, so ganga tað í dag í alt 76 næmingar í 7. flokki í hesum skúlum, sum høvdu flutt til hádeild í øðrum skúla, var broytingin framd áðrenn hetta skúlaárið.

Fyrimunir fyri hesar skúlar verða við hesi broyting, at teir sum barnaskúlar einvíst kunnu hugsavna seg um grund og miðdeild, har teir sleppa undan at byggja, varðveita og viðlíkahalda stovur, tilfar og amboð til lærugreinarnar í hádeild, bara til lutfalsliga fáar tímar hjá einstøkum 7. flokki.

Hetta verður ein greiður fyrimunur í móttøkuskúlunum, har allir næmingar í hádeildini beinanvegin í 7. flokki verða savnaðir saman við hinum eldru næmingunum í hádeildini, sum teir hava so nógv til felags við, bæði í mun til lærugreinar, fakøki og innihald í undirvísingini. Við eini samlaðari og størri eind í hádeildini fær móttøkuskúlin enn fleiri møguleikar longu frá 7. flokki at bjóða næmingunum áhugaverdar vallærugreinir, meira fjølbroytta faksamanseting og tillagaða tímatalvu við eitt nú tvørfakligari undirvísing.

***Inklusjón***

Fyri at tryggja øllum børnum eins atgongd til dygdargóða skúlagongd er neyðugt at áseta málið at menna inkluderandi skúlaskap í lógarverkinum. Endamálið er at tryggja, at allir næmingar fáa møguleika at vera inkluderaðir, virknir, trívast, læra og mennast í fólkaskúlanum.

Skúlin skal tryggja eitt sterkt og inkluderandi læriumhvørvi, sum viðurkennir fjølbroytni sum virðismikið tilfeingi, og er grundarlag undir eini uppbyggjandi mentan, har bæði faklig og sosial menning eru í miðdeplinum. Slík læriumhvørvi mennast og varðveitast í greiðum og umsorgarfullum samstarvi millum næmingar og lærarar.

Eitt inkluderandi skúlaumhvørvi arbeiðir miðvíst við tveimum høvuðsendamálum:

- At eyðmerkja og minka um forðingar fyri læring og luttøku.
- At økja stuðulin til luttøku og læring í einum læringsumhvørvi, har allir næmingar mennast og læra.

Ein inkluderandi skúli er altíð í menning og broyting fyri at kunna møta tørvinum hjá einum fjølbroyttum næmingahópi. Lyklaorðið í hesum sambandi er fjølbroytt undirvísing (undirvísingardifferentiering), sum verður tillagað til fjølbroytni, so skúlin rúmar og stuðlar øllum næmingum á besta hátt.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Grundhugsanin við hesum lógaruppskotinum um at stytta skúladagin við færri undirvísingartímum er, at vit við færri tímum fáa meira dygd í hvønn einstakan undirvísingartíma. Tá ið næmingarnir ikki hava ov nógvar undirvísingartímar, tá hava teir

meira orku og bindindi til at hugsavna seg um innihaldi í undirvísingini, har næmingarnir kunnu dríva á og gera sær ómak, soleiðis at teir við gleði og forvitni kunnu nema sær nýggjan og áhugaverdan lærdóm.

Við at minka um undirvísingartímatalið verður størri fíggjarlig orka til at seta inn við fleiri lærarakreftum í undirvísingartímunum og harvið víðka um tvílæraraskipanina, soleiðis at meira læraratíð verður til hvønn einstakan næming.
Harafturat verður eftir ætlan eisini størri rásarúm og fíggjarorka til at raðfesta og styrkja játtanina til flokslæraran, soleiðis at flokslærarin saman við sínum flokstoymi fær betri stundir til at ráðleggja og leggja til rættis munagóð trivnaðarátøk og undirvísingargongdir.

Nýskipanin við hesum uppskoti ber við sær, at Alis- og evnafrøði frá at hava verið kravd lærugrein í 7. flokki og vallærugrein í 8.-9. flokki, nú verður kravd lærugrein í allari hádeildini, tvs. í 7.-9. flokki.

Samstundis verður ásett, at møguleiki verður fyri at velja týskt í 7.flokki og harvið fáa undirvísing í heili 3 ár, heldur enn 2 ár, sum í galdandi lóggávu.

Fleiri av broytingunum í hesum lógaruppskoti harímillum broytingarnar í § 26, hava sum fortreyt og taka útgangsstøði í, at bygnaðurin av øki skúlamyndugleikans kring landið verður broytt soleiðis, at skipanin av bygnaðinum er í samsvar við greiða býtið millum 1.-.6 skúlaár í grund- og miðdeild, og 7.-9. flokk í hádeild.

Hetta inniber sambært broytingini í § 26, at móttøkuskúlar framyvir taka ímóti næmingunum í hádeild, tað vil siga eftir 6. flokk, og ikki sum áður eftir 7. flokk.

Høvuðsorsøkin til hesa broyting er, at hetta í nógv størri mun er í samsvar við skipanina av innihaldinum, undirvísingartímunum og lærugreinunum í fólkaskúlanum.

Byrjunarundirvísingin í grunddeildini í 1.-3. flokki hongur væl saman sum ein eind við nógvum teimum somu grundleggjandi lærugreinunum.

Miðdeildin hongur eisini væl saman sum ein natúrlig eind við nýggjum lærugreinum so sum enskum, søgu og náttúru og tøkni. Tó er lopið hjá næmingunum úr 6. flokki til 7. flokk heldur stórt við lutfalsliga nógvum nýggjum kravdum lærugreinum og vallærugreinum. Tí er tað mest natúrligt og skynsamt, at yvirgongdin úr miðdeild til hádeild er eftir 6. flokk.

Henda broyting kemur at føra til betri gagnnýtslu av resursum kring landið, tí við hesum nýtast skúlar við grund- og miðdeild ikki at byggja og varðveita serstakar fakstovur til eitt nú lívfrøði og alis-evnafrøði bert til 7. flokk, har stovurnar kunnu standa tómar og óbrúktar ov stóran part av skúladegnum, tí tað ikki eru so nógvir tímar á tímatalvuni í hesum lærugreinum.

Fyri fyrstu ferð verður inklusjón nevnt í fólkaskúlalógini, sum er fyrsta stig á leiðini til at íverkseta visjónina um, at gera føroyska skúlaumhvørvið enn meira inkluderandi.

Samlaða endamálið við hesum lógaruppskoti er at tillaga tímatalið og skapa betri karmar fyri trivnað og læring. Við hesum verður lagt upp til ein styttri, men effektivari skúladag har dentur verður lagdur á dygdina av undirvísingini og trivnaðin hjá næmingunum.

Við fíggjarligu sparingini av at stytta skúladagin, verður peningur nýttur til at styrkja tvílæraraskipanina og flokslæraraskipanina, soleiðis at næmingarnir fáa betri stuðul, bæði persónliga, sosialt og fakliga.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Undirvísingarstýrinum, Námi, Sernámi, Námsvísindadeildini, Føroya Lærarafelag, Skúlaleiðarafelagnum, Næmingaráðunum, Føroya Pedagogfelag, Kommunufelagnum, Gigni, Megd, og Foreldrafelagnum Heim og Skúli, Frískúlin Keldan umframt hjá aðalráðunum.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Sambært útrokningum hjá Undirvísingarstýrinum verður tað fyri landið ein sparing á umleið 35 ársverk av at stytta skúladagin við at minka um undirvísingartímatalið, men ætlanin er at mestsum allur hesin peningur verður nýttur til at víðka og styrka um tvílæraraskipanina, umframt raðfesta meira tíð til flokslærarauppgávuna.

Viðvíkjandi fíggjarligum avleiðingum fyri kommunurnar, so kemur hetta at viðføra eina lítla sparing fyri kommunur við fólkaskúlum við bert grund- og miðdeild, tí hesir skúlar ikki longur hava rakstrarútreiðslur til 7. flokkar. Hinvegin verður ein lítil meirkostnaður fyri kommunur við fólkaskúlum, har tað eisini er hádeild.

Fyri kommunurnar verða fíggjarligu avleiðingarnar, at tær mugu tillaga umbyggingar, útbyggingar og nýbyggingar av skúlum og skúlastovum í mun til, um tær hava fólkaskúlar við grund- og miðdeild, ella um tær eisini hava skúlar við 7. flokki og hádeild.

Flutningskostnaðurin hækkar nakað hjá teimum kommunum við skúlum, sum í dag hava næmingar til 7.flokk, vísandi til at næmingar framyvir flyta í skúla hjá aðrari kommunu eftir loknan 6.flokk.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Mett verður, at Undirvísingarstýrið fer at hava nakað av eyka umsiting fyrstu tíðina, tá broytingarnar skulu setast í verk.

Mett verður ikki, at uppskotið hevur munandi umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Uppskotið hevur við sær avleiðingar fyri tey øki í landinum, ið hava skúlar við flokkum til og við 7. flokk, tí hesir skúlar koma eftir lógarbroytingarnar at hava flokkar í grund og miðdeild, sum verða til og við 6. flokk.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki ávirkan á millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar, tá hugsað verður um breksáttmálan. Víst verður í hesum sambandi til § 24 í sáttmálanum har ásett er, at limalondini skulu tryggjað eina inkluderandi útbúgvingarskipan á øllum stigum.

Nýggjasta frágreiðingin frá Sameindu Tjóða (CRPD, september 2024) vísir á, at nevndin er stúrin um økta talið av næmingum, sum fáa undirvísing í segregeraðum undirvísingartilboðum í øllum kongaríkinum Danmark. Heitt verður á skúlamyndugleikarnar at virka fyri, at fleiri næmingar verða inkluderaðir í skúlaverkinum og somuleiðis at gera skipanaligar broytingar við at taka burtur forðingar sum hava forða fyri at næmingar, sum bera brek verða fevnd í útbúgvingarskipanini.

Mett verður, at fyriliggjandi uppskot er í tráð við hetta.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ongar skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur heimild til landsstýrismannin at áseta nærri reglur um inklusjón.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### Til § 1, nr.1

### Serlig viðmerking til § 2, stk. 3:

Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á inklusjón.

Broytingin í endamálsorðingini til fólkaskúlan er liður í arbeiðinum við at íverkseta politisku visjónina um ein enn meira inkluderandi kós innan føroyska fólkaskúlan.

### Til § 1, nr. 2

### Serlig viðmerking til § 5, stk. 2, nr. 2, litra d:

Við hesi broyting í § 5, stk. 2, nr. 2, litra d, verður lærugreinin alisfrøði og evnafrøði kravd lærugrein fyri allar næmingar í 7., 8. og 9. flokki í fólkaskúlanum. Í galdandi lóggávu er alisfrøði og evnafrøði kravd lærugrein í 7. flokki, meðan hon er vallærugrein í 8. og 9. flokki. Við hesi broyting verður tryggjað, at allir næmingar fáa eina samanhangandi og støðufasta undirvísing í alisfrøði og evnafrøði gjøgnum øll árini í hádeildini.

### Til § 1, nr. 3

### Serlig viðmerking til § 5, stk. 2, nr. 4:

Við hesi broyting verður staðfest, at lærugreinirnar í handaverki og list skulu vera kravdar lærugreinar fyri næmingar í 1.-6. flokki. Í galdandi lóggávu er ásett, at lærugreinirnar í handaverki og list eru kravdar lærugreinar í 1.-7. flokki.

Tær fimm lærugreinarnar innan handaverk og list eru tilevning, handarbeiði, smíð, heimkunnleiki og sangur og tónleikur. Henda broyting tryggjar, at hesar lærugreinir eru ein fastur partur av undirvísingini fyri øll børn í teirra fyrstu skúlagongd í grund- og miðdeildini, soleiðis at allir næmingar fáa grundleggjandi vitan og førleikar innan kreativa og skapandi fakøkið.

Broytingin samsvarar við, at ein greiður skilnaður verður gjørdur millum grund- og miðdeildina í 1.-6. flokki og hádeildina í 7.-9. flokki.

**Til § 1, nr. 4**

**Serlig viðmerking til § 5, stk. 4:**

Við hesi broyting verður ásett, at undirvísing í týskum skal standa næmingunum í boði sum vallærugrein í 7.-9. flokki. Týskt, sum nú er vallærugrein í 8.-9. flokki, verður víðkað til at verða vallærugrein í allari hádeildini, tvs. í 7.-9. flokki. Við møguleikanum at velja týskt sum fremmandamál í 7. flokki, so fáa næmingarnir eina longri og meira samanhangandi málfrøðiliga læring í hádeildini.

Henda broyting í grein 5, stk. 4 er somuleiðis eitt týðiligt stig í at gera ein greiðari skilnað millum grund- og miðdeild í 1.-6. flokki og hádeild í 7.-9. flokki.

**Til § 1, nr. 5**

**Serlig viðmerking til § 9, stk. 1:**

Við hesi broyting verður ásett, at næmingar longu frá 7. flokki fáa møguleikan at velja vallærugreinir og evni, sum áður vóru tilboð til næmingar í 8.-10. flokki. Hetta er ein partur av endurskipanini av deildarbýtinum í fólkaskúlanum, har hádeildin nú kemur at umfata 7.-9. flokk, í mun til áður, har hádeildin byrjaði í 8. flokki. Við broytingini í § 9, stk. 1 verður tryggjað, at næmingar longu frá 7. flokki fáa atgongd til sama fjølbroytni av vallærugreinum, sum teir annars í galdandi lóggávu hava fingið í 8.-10. flokki.

Vallærugreinirnar umfata evni sum sjóvinna, tøknifrøði, tónleik, drama, umframt fleiri skapandi og handaligar lærugreinir, sum geva næmingum møguleika at menna praktiskar førleikar og kreativt hugflog. Hetta førir við sær, at næmingar fyrr í skúlagongdini fáa høvi at velja lærugreinir, sum samsvara við teirra áhugamál, hegni og møguligar framtíðarætlanir.

Við broytingini fáa eisini næmingar í 7. flokki atgongd til eina breiða røð av vallærugreinum, sum kunnu vera við til at økja um teirra motivatión og fakligu menning. Hetta kann eisini vera við til at stuðla undir teirra áhuga fyri ávísum yrkisleiðum, serliga innan handaligar, kreativar og tøknuligar førleikar, og soleiðis betra um møguleikarnar fyri einum persónligt tillagaðum útbúgvingarvegi ella yrkisleið.

**Til § 1, nr. 6**

**Serlig viðmerking til § 14, stk. 2:**

Endamálið við hesi ásetingini er at broyta skipanina fyri eftirmeting av næmingum í fólkaskúlanum við tey broyttu floksstigini, har hádeildin nú eisini fevnir um 7. flokk í staðin fyri sum áður frá 8. flokki. Hetta merkir, at næmingar á 7.-9. floksstigi framyvir skulu fáa talmet (støðutalmet) í royndarlærugreinunum.

**Til § 1, nr. 7**

**Serlig viðmerking til § 14, stk. 8:**

Endamálið við hesi broyting er at samskipa eftirmetingina av næmingum í fólkaskúlanum í samsvari við broytingina, har hádeildin nú byrjar í 7. flokki í staðin fyri í 8. flokki.
Við hesum verður tryggjað, at eisini næmingar í 7. flokki fáa eina eftirmeting í talmetum í minsta lagi tvær ferðir um árið, sum áður var galdandi fyri næmingar frá 8. flokki og uppeftir.

**Til § 1, nr. 8**

**Serlig viðmerking til § 19, stk. 1 og 2:**

Við hesum lógaruppskoti er ætlanin at tillaga og stytta samlaða vikutímatal næminganna í fólkaskúlanum, serliga fyri at bøta um teirra trivnað og læring. Talan er her um eitt týdningarmikið stig til tess at betra um dygdina av undirvísingini við at minka um talið av undirvísingartímum um vikuna. Tað eru serliga tríggjar meginorsøkir til hesa lógarbroyting, og hesar eru øktur trivnaður, størri effektiv nýtsla av undirvísingartímunum og betri faklig dygd og læruúrtøka.

Við hesi lógarbroyting verða tað í 1. og 2. flokki 23 tímar og í 3. flokki 25 tímar um vikuna. Harvið er tað í grunddeildini ein lækking á tilsamans 7 undirvísingartímar um vikuna.

Í 4. og 5. flokki verða tað framyvir 28 tímar um vikuna og í 6. flokki 29 tímar um vikuna.
Í miðdeildini verður tað hervið ein samlað lækking á 7 undirvísingartímar um vikuna.

Í 7., 8,. og 9. flokki verða tað íroknað vallærugreinir í alt 31 undirvísingartímar um vikuna.
Í hádeildini verður tað ein samlað lækking á 14 tímar um vikuna, tá vit írokna kravdu lærugreinarnar, umframt alis-evnafrøði og týskt.

Samlað sæð ein lækking í 1.-9. flokki á í alt 28 tímar um vikuna íroknað vallærugreinir.

Hetta verður galdandi frá skúlaárinum 2026-2027, tá byrjað verður við at lækka undirvísingartímatalið í 1. – 7. flokki, og síðani verður hetta endaliga sett í gildi eftir trimum árum, í 8. flokki í skúlaárinum 2027-2028 og í 9. flokki í skúlaárinum 2028-2029.

Broytingin verður framd yvir 3 ár fyri at geva øllum pørtum í fólkaskúlanum tíð til at tillaga virksemi, próvtøkur og námsætlanir í mun til broytta tímatalið og tíma- og lærugreinabýtið í 8. og 9. flokki.

**Til § 1, nr. 9**

**Serlig viðmerking til § 19, stk. 7:**

Henda lógarbroyting snýr seg fyrst og fremst um at tillaga og lækka undirvísingartímatalið í skúlum, sum ikki eru ársbýttir. Samstundis er lógaruppskotið tillagað í mun til, at 7. flokkur nú verður roknaður sum partur av hádeildini, og tí er 6. flokkur nú hægsti flokkur í skúlum, sum ikki eru ársbýttir.

Við nýggju orðingini í § 19, stk. 7 verða tillagaði tímatalskrøv sett fyri skúlar, sum ikki eru ársbýttir. Hetta tímatalið verður lækkað í samsvari við, at samlaða tímatal næminganna í fólkaskúlanum verður lækkað sum heild. Hetta avspeglar tær broytingar, sum eru gjørdar í § 19, stk. 1 og stk. 2, har samanlagda tímatalið fyri skúlagongdina er lækkað.

Samstundis er tímatalið nú betri lagað til næmingatal og aldursbýtið hjá næmingunum, soleiðis at tað er meira í samsvari við tey fakligu krøv, sum eru í teimum smærru skúlaflokkunum í grund og miðdeildini.

**Til § 1, nr. 10**

**Serlig viðmerking til § 26, stk. 1:**

Við hesi broyting verður ásett, at kommunustýrið hevur skyldu at skipa so fyri, at øll børn, sum búgva í øki skúlamyndugleikans, fáa undirvísing í hesum sama øki tey fyrstu 6 skúlaárini, í mun til tey fyrstu 7 skúlaárini, sum áður vóru ásett í galdandi lóggávu.

Hetta er í samsvari við deildarbýtið í fólkaskúlanum, har grundskúlin í fólkaskúlanum verður skipaður í tríggjar deildir, ið eru grunddeild (1.-3. flokkur), miðdeild (4.-6. flokkur) og hádeild (7.-9. flokkur).

Við hesum verður undirvísingin í grund- og miðdeildini staðsett innan skúlamyndugleikan hjá kommununi, meðan næmingar í hádeildini fáa møguleika fyri undirvísing innan eina víðkaða geografiska skipan, um so er, at kommunan ikki sjálv bjóðar undirvísing til hádeild.

Endamálið við broytingini er sostatt at skapa ein meira greiðan og samanhangandi bygnaðarligan skilnað millum grunddeild, miðdeild og hádeild, har tað somuleiðis verður stuðlað undir eina meira fleksibla, effektiva og dynamiska skúlagongd í hádeildini.

Somuleiðis er møguleiki hjá kommunum at samstarva um at bjóða næmingum eina breiða, fjølbroytta og fakliga víðkaða undirvísing.

**Til § 1, nr. 11**

**Serlig viðmerking til § 26, stk. 1 og stk. 3 og í § 29, stk. 2:**

Við hesi lógarbroyting verður orðingin í § 26, stk. 1 og stk. 3, og § 29, stk. 2 broytt frá í “8., 9. og 10." til "í 7., 8., 9. og 10.", soleiðis at 7. flokkur verður ein formellur partur av hádeildini.

Hetta er eitt framhald av tí framdu broyting í fólkaskúlaskipanini, har skúlagongdin nú meira greitt verður skipað í tríggjar deildir: grunddeild (1.-3. flokkur), miðdeild (4.-6. flokkur) og hádeild (7.-9. flokkur).

Henda skipanin merkir, at næmingar komnir í 7. flokk nú skulu roknast sum partur av hádeildini, bæði tá ið tað kemur til skipan av undirvísing, til útboð av vallærugreinum.

**Til § 1, nr. 12**

**Serlig viðmerking til § 31, stk. 2 og stk. 3:**

Við hesum verður tað natúrligt, at 7. flokkur eisini verður taldur við, tá ið skúlasambond verða skipað millum fleiri kommunur um undirvísing í hádeildini. Við at broyta orðingina í § 31, stk. 2 og 3 tryggjar lógaruppskotið, at skúlasambond, sum í dag fata um 8.-10. flokk, við hesi broyting eisini umfata 7. flokk.
Hervið gerst 7. flokkur partur av tí felags undirvísingartilboði, ið skúlasambandið bjóðar.
Við hesum fáa vit eina samanhangandi skipan, har allir næmingar í hádeildini frá 7. til 10. flokk, fáa somu møguleikar at vera partur av samstarvi millum fleiri skúlamyndugleikar.
Tað verður harumframt lættari fyri ymsar skúlamyndugleikar at samskipa sítt tilboð til næmingar, tá ið tað er greitt, at hádeildin nú umfatar 7.-10. flokk.

Við broytingini verða skúlar við 7. flokki tiknir við í skúlasambond, og leiðarin fyri skúlan, sum hevur 7.-10. flokk, kann eisini gerast leiðari fyri skúlasambandið sbrt § 31, stk. 3. Hetta styrkir um møguleikan at leiða felagsskúlar meira effektivt, smidligt og trygt.

Endamálið við hesi broyting er sostatt at hava eina lagaliga, samanhangandi og effektiva skipan, har skúlasambond kunnu fevna um alla hádeildina í einum øki frá 7. til 10. flokk, í samsvari við nýggju skipanina av skúlaflokkunum og deildunum í fólkaskúlanum.
Henda broyting ger tað greitt, hvussu skúlasambond skulu skipast og umsitast í framtíðini, umframt tryggjar øllum í hádeildini javnbjóðis møguleikar til eitt væl skipað tilboð.

**Til § 1, nr. 13**

**Serlig viðmerking til § 34, stk. 1:**

Henda broyting við at útvega tilskot til næmingar frá 7. flokki, heldur enn frá 8. flokki, er ein beinleiðis fylgja av tí nýggju skipanini, har hádeildin nú verður roknað frá 7. flokki til 10. flokk.

Við hesum verður tað neyðugt, at lógargrundarlagið fyri fíggjarliga stuðulin eisini fevnir um 7. floks næmingar, soleiðis at foreldur, hvørs børn eru noydd at ganga í skúla í øðrum kommunum, fáa somu fíggjarligu trygd fyri uppihalds- og flutningsútreiðslum, tá tey byrja í hádeildini.

**Til § 1, nr. 14**

**Serlig viðmerking til § 41 a:**

Til stk.1

Inklusjón í skúlaumhvørvinum snýr seg um at stremba eftir at skapa eitt rúmligt og fjølbroytt læringsumhvørvi, har allir næmingar hava javnbjóðis møguleika at taka lut í felagsskapinum.

Hetta merkir, at øll skúlaumhvørvi miða eftir at hava eina tilvitaða tilgongd til at økja um luttøkumøguleikar hjá øllum næmingum og at minka um vandan fyri útihýsan úr námsætlanum, skúlamentanum, læringsfelagsskapinum og sínum javnaldrum.

Hetta er at skilja so, at skúlin hevur skyldu til at virka til frama fyri inklusjón. Viðmerkjast skal, at dentur eigur at vera lagdur á at síggja møguleikar og minka um forðingar sum kunnu vera í skúlaumhvørvinum fyri at næmingurin kann vera inkluderaður, samstundis sum næmingurin kann fáa hóskandi stuðul til at luttaka, trívast og læra. Ein inkluderandi tilgongd leggur dent á at endurskipa mentanir, reglur og mannagongdir í skúlaumhvørvinum. Hetta verður gjørt við atliti til fjølbroytni í næmingahópinum, so øll fáa javnbjóðis møguleikar at læra og trívast.

Skúlar hava ábyrgdina av at tryggja, at allir næmingar – óansæð førleikar, bakgrund ella sosialar treytir kunnu: **vera fysiskt til staðar, luttaka virkin**, **kenna og uppliva seg vælkomin og læra og menna seg**.

Ein inkluderandi skúli er eitt stað, har fjølbroytni verður sædd sum ein grundleggjandi fortreyt og styrki fyri nútímans skúlan. At menna ein inkluderandi skúla krevur eina samanhangandi og fjølbroytta tilgongd, har fleiri pallar verða virknir og eru involveraðir í tilgongdina (Poulsen, 2023).

Tann inkluderandi skúlin strembar eftir at menna eitt inkluderandi skúlaumhvørvi, sum kann vera bæði ein heilur skúli, deild, flokkur, bólkur o.a. Samstundis miðar tann inkluderandi skúlin eftir at skipa smidligar og fjølbroyttar inkluderandi karmar, sum hóska til ávísar næmingar ella næmingabólkar, sum kunnu hava ymiskar serligar tørvir í longri ella styttri tíð (vísandi t.d. til grein 45).

Greinin ásetur somuleiðis, at undirvísingin skal virka fyri at næmingarnir búgvast og læra, hvat fremur góða heilsu.

Til stk.2

Heimilar landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um inklusjón.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu 1. juli 2026.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 20. desember 2024

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: